# Nú pantseta teir frælsið – í donskum varmapútum !

*tórbjørn jacobsen*

Kammerátar. Kenda tiltalusniðið hjá øllum heimsins kommunistum rungaði millum húsaveggirnar á Vaglinum fyri tríati árum síðani. Ungur framamaður royndi í svart/hvíta heiminum at tosa fyri heimsfatanini hjá politbýronum í Kreml. Nú situr hann á ovastu rók í sosialdemokratiskum flokki, ið letur sær lynda, at Pinochet-fjepparin Óli Breckmann er sjefdomptørur í hini mest konservativu og asosialu heimastýrisstjórn nakrantíð. Kanska hevði ein marxistiskur ástøðingur rætt, táið hann tvíhelt um, at sosialdemokratisku flokkarnir ikki kundu brúkast í kollveltingarligа stríðnum hjá teimum fæleysu, men heldur eru valmaskinur, skaptar til parlamentsval og hitt parlamentariska stríðið. Og haðani er stutt út á rekamið, íður og vaggandi gjálv. Tað ræður bara um at fløkja seg upp í onkra valdskabalu. Politiski substansurin er óviðkomandi. Bæði táið ræður um loysing ella samband – vinstra ella høgra. Gallíónsfigurar, sum svíkja arbeiðarafjøldina og pantseta føroyska frælsið í donskum varmapútum. Politiskt korrumperaðir korridor- covboyarar, ið dyrka sítt egna vald meira enn nationalu áhugamálini og lívslunnindini hjá fólkinum, sum valdi teir.

Føroyskir høvundar kunna hava sínar makabru løtur. Ein skrivaði einaferð eina stuttsøgu um føroyskan ríkmann, ið lá álvarsliga sjúkur á Ríkishospitalinum. Tað einu náttina vaknar hann táið hurðin spakuliga fer upp, og í hurðagapinum stendur deyðin. – Eg eigi 10% av partapeninginum í Sjóvinnubankanum, sigur ræðslusligni ríkmaðurin. Men upplýsingurin sá ikki út til at imponera deyðan. – Eg eigi tveir trolarar, royndi ríkmaðurin meira spakførur, men sama skilið. Deyðin nærkast seingini. Síðani græt hin sjúki, at hann var limur í kirkjuráðnum, átti ein stóran handil, konu og fýra børn. Men sama skilið. Deyðin var nú komin heilt yvir til seingina og eggin á líggjanum blunkaði. Tá spældi hin ríki út sín seinasta trumf. – Eg eri limur í Havnar Klubba. Og tað virkaði. Tá bakkaði deyðin. Fekk hesa fittu heilsanina í brævi, frá føroyskum skaldi, sum sat og trónaði suðuri á Balkan, í Makedoniu, og hevði frætt um dramaðið, táið kapitalistiska elitan, í djúpu Chesterfield lenustólunum, sat á sínum Parnassos, og savnaði allar tær svørtu kúlurnar saman – fráboðanin um frávalið av einum ov kontroversiellum útgerðarmanni av Glyvrum. Av óvart var eg komin í uppskot og upp at hanga á bróstinum í hesi bráðpannu av snobbi og fíggjarligum glarfiti.



*Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður var millum røðararnar á 1. mai haldinum í Havn í ár.*

Ikki løgið, at maðurin í slógvnum úti á Bacalao helt meg vera potentiellan kandidat - til at bera fram míni sjónarmið á sjálvum arbeiðaradegnum. Soleiðis flytast mørkini. Tíðirnar skifta. Pelar verða royttir upp úr svørðinum og stikini flutt. Hetta er lívið.

"Vi har sejret ad helvede til", hesa bombastisku fráboðan varpaði danski LO-bossurin, Thomas Nielsen, sáli, út um allar geilar, við høgari sigarføring, hábæri og einum íbornum jovialiteti, sum segði spar tvey til alt annað. Hann var sannførdur um, at sosialdemokratiski fakfelagspolitikkurin hevði vunnið ein nærum totalan sigur. Lítið og onki var at berjast fyri longur á arbeiðsmarknaðinum. Onkur snøkil kanska, men høvuðsmálini vóru skorað ígjøgnum og arbeiðarin hevði vunnið sær so sjálvsøgd og sømilig rættindi, at sjálvt høgraheykarnir inni á Christiansborg ikki tordu at nema tey við einum klova – eini eldtong.

1. mai er dagurin hjá teimum, sum selja sína arbeiðsmegi, sínar vøddar og sín heilamátt, fyri hægstbjóðandi, á arbeiðsmarknaðinum. Dagurin hjá abbanum í snøgga sanginum hjá Finnboga Ísaksen "Far lítli útum.........", harið eina ørindi ljóðar: "Hví abbasa bein munnu vera so veik, hví skeggið á høku man sita, hví vangin er gráur, hví ryggurin sveik – á, livir tú, fært tú at vita !" Dagurin hjá Kalla Katt, sum gekk sær tann obligatoriska kajtúrin, ímillum trý og fimm, og ímeðan konteynarar, øl, brennivín og timbur varð innskipað, legði hann slitnu beinagrindina fram á stavin og í friðsemi og hvíld skoðaði hann farna verk sítt, í ævigari endurføðing, - hvønn hin einasta dag. Hesin dagurin er ongin tilvild. Í honum rúmast ein søga, ið er so magnfull sum ongin onnur. Eitt samankók av blóði, sveitta og tárum. Feigd og aga. Tapum og sigrum. Menning og søga hjá óteljandi ættarliðum.

Hundrað ár eftir fronsku kollveltingina og fyri nærum stórthundrað árum síðani, bleiv avrátt, at 1. mai skuldi hátíðarhaldast sum dagur verkamanna, og hendan dagin skuldi arbeiðararørslan, um allan heim, seta fram síni sjónarmið og krøv - við kravgongum og røðum.

Á aðru millumtjóða arbeiðararáðstevnuni – vanliga rópt onnur Internationala – sum varð sett og hildin í franska metropolinum París í 1889, vórðu avgerðandi krøv sett fram, um munabetri sosiala trygd og tá kom eisini upp kravið um lógáseting av 8-tíma longum arbeiðsdegi. Krøvini, semjurnar og nýggja rákið í hesum gamla heimsparti var beinleiðis orsøkin til, at stríðsdagurin hjá arbeiðarunum varð ásettur og síðani hevur verið hátíðarhildin.

Onki kemur av ongum. Nógv var viðurfarist undan hesum. Byltingarfúsir fraklendingar skipaðu fyri uppreistri í 1789 undir herrópinum: "Liberté, égalité et fraternité" – "Frælsi, javnaður og brøðralag"

Ídnaðarkollveltingin tók seg fram seinast í 18. og fyrst í 19. øld og úr hennara kjalarvørri og nýggju framleiðsluhættunum, ið so við og við dagaðu undan, hevjaði seg ein nýggj stætt av fólki – hin nú so klassiska arbeiðarastættin.

Ótálmaða jakstranin eftir profitti fekk sjálvandi avleiðingar fyri tann veikara partin í hesum høpi. Tey, ið hildu hjólunum gangandi, vóru frá fyrsta degi mergsogin, vanvird og trælkað. Sjálvsagda avleiðingin gjørdist, at henda nýggja stætt skipaði sær eitt fakfelagsligt undirstøðukervið, ið kundi standa upp ímóti áhugamálunum hjá entreprenørunum, ið savnaðu sær alt meira av valdi, sohvørt sum vavið á kapitalinum blomstraði og vaks. Har byrjaði stríðið, sum ongantíð endar. Áhaldandi stríðið fyri batnandi korum. Fakfelagsstríðið. Í byrjanini nationalt, men skjótt fekk arbeiðararørslan altjóða snið og á millumtjóða stigi rann á fyrsta sinni saman í 1864. Tað hendi táið teir stóru heimspekingarnir Karl Marx og Friedrich Engels settu fyrstu millumtjóða arbeiðararáðstevnuna í London hetta sama árið. 16 ár eftir, at teir báðir høvdu skrivað hitt kommunistiska manifestið.

Tað slepst valla undan, at nevna árið 1871 á einum arbeiðaradegi. Tá hendi nakað, sum fekk avgerðandi ávirkan á søguligu gongdina nógv ár frameftir. Av tjóðskaparligum og samfelagsligum orsøkum tóku íbúgvarnir í høvuðsstaði Fraklands, sakina í egnar hendur, tóku ræði á hesum kenda býi og stovnsettu nakað so sjaldsamt, sum eina arbeiðarakommunu í hinum kringsetta París. Eitt frambrot. Eitt nýbrot. Treyðugt so, henni varð ikki lív lagað, virkaði bara í skamma stund, fram til lagnuløtuna, táið hon varð týnd í eini blóðugari massakru, ið var fyriskipað av stjórnarherliðunum úr Versailles, væl stuðlaðið og hjálpt av týsku hermegini, ið tá stóð væl innan fyri landamørk Fraklands.

Í tíðarhvarvi eitt intermezzo, kanska, men ongin ivingur er um, at hendan byltingin setti hvøkk í valdsharrarnar í Europu. Arbeiðarastættin hevði sýnt sína styrki og sína íkomnu tilvitsku, og sagt verður, at hetta nýggja rákið gjørdist týðandi íkast til byrjanina av fyrra veraldarbardaga. Eftir at Parísarkommunan var fallin, yrkti ein av limum hennara hin vælkenda stríðssangin: "Kom kúgaðu kring allan heimin, øll niðurboygd av sorg og neyð. Nú kyknar eldurin úr eimi, nú verður stríð um lív og deyð." – ella Internationali, sum hann vanliga verður róptur. Árið eftir liðaðist altjóða arbeiðararáðstevnan sundur, og varð ikki uppafturtikin fyrrenn í 1889. Virkað var fram til fyrra heimsstríð, sum av góðum grundum steðgaði øllum, og hinvegin var tá so nógvur politikkur gingin í Internationalu ráðstevnuna, at hon ikki framhaldandi kundi virka sum savnandi depil fyri allar fæloysingar í øllum londum.

Síðani tá hevur arbeiðararørslan verið fyri tapum og kanska í størri mun fyri sigrum. Verið nýtt og misnýtt í persónligari tráan eftir stjórnarvaldi. Verið skálkaskjól hjá diktatorum og ormetin av pamparum, sum reyða skaldið yviri við Strond so beinrakið sigur tað í yrkingini:

*Men lágir menn*
*trívast ikki í skugganum av*
*føgrum eikitrøum*
*Ikki fyrr enn lyngur og kjarr*
*grør um feldu bularnar*
*trína teir fram*
*drekka skál við maktini.*

So hvørt sum føroyska samfelagið mentist úr feudalinum til eitt fiskivinnu- & eitt ídnaðarsamfelag íkom eisini um okkara leiðir tørvurin á fakfelagsligum virksemi. Navigatørfelagið varð sett á stovn í 1892. Fiskimannafelagið í 1911. Fylking í 1915. Føroya Arbeiðarafelag í 1925. Bara fyri at nevna nøkur.

Fakfeløgini hava havt týðandi og avgerandi leiklut í framtøkuni í føroyska samfelagnum. Tað svitast ikki. Men samstundis er tað púra rætt, sum formaður Havnar Arbeiðsmannafelags segði fyri ári síðani, at tað kennist órógvandi so lítil áhugi, sum nú tykist vera fyri arbeiðaradegnum. Hesi seinastu árini nøkur fá tandur, ið hava hokið framvið gamla Kommunuskúlanum og ditto Bókhandlinum, í royndini at frætta hvatið nakrir yvirgøddir breyðpolitikarar hava at siga teimum, sum knossa fyri síni úrkomu, tíma fyri tíma, á flakavirkjum, í egningarskúrum, í bilsmiðjum, á kajuni, í krambúðum og so fordont. Her er ongin glóð, onki engasjemang,